Rækjuflotin aftur vorðin meira attraktivur:

# Tað er næstan ikki dagur, at m




**Seinasta hóskvøld kom rækjutrolarin, Napoleon, aftur av rækjuleiðunum við Flemmish Kap og Grand Bank við út við 400 tonsum av rækjum. Skipari hendan túrin var skálamaðurin, Petur Sigurd Petersen. Napoleon fór avstað aftur mánakvøldið, og tá var hin skiparin, Pauli Justinussen, á brúnni. Sosialurin hevur skift orð við Paula**

RÆKJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Pauli Justinussen er eisini skálamaður eins og Petur Sigurd Petersen. Hann er 28 ára gamalur, útbúgvin skipsførari og hevur siglt sum skipari við Napoleon í hálvt triðja ár. Skálamenninir skiftast um at føra skipið. Hesaferð bar leiðin yvir til Eysturgrønlands, har teir eiga 115 tons av rækjum.

Sólborg er undir Eysturgrønlandi, har teir hava roynt í eina tíð og sum skilst, hava teir havt hampiligar dagar. Havborg er nú eisini um at verða komin upp á pláss í Eysturgrønlandi.

Av teimum út við 400 tonsunum hjá Napoleon hendan túrin, er ein stórur partur kókaðar rækjur. Tær stóru rækjurnar verða fyri tað mesta seldar í Evropu, meðan tær smáu fara til Kina.

Sum skilst, hevur Napoleon hendan túrin lagt seg eftir at fiska hampiliga góðar rækjur, tí tær geva meira í peningi.

### Í andgletti

Sosialurin hitti Paula Justinussen, áðrenn teir loystu mánakvøldið og settu kós móti Eysturgrønlandi.

Seinastu árini hevur rækjuflotin rættiliga verið í andgletti. Nógv skip eru farin av úr flotanum, summi av knóranum, og í løtuni eru bert fimm skip eftir undir føroyskum flaggi.

Tosað hevur verið um ymiskar møguleikar at veita rækjuflotanum eina hjálpandi hond, so vit ikki púrasta missa hendan partin av flotanum.

Álit eru skrivað, men einki er komið burtur úr.

Umleið helmingurin av tí rækjuflota, vit fyri nøkrum árum síðan høvdu, hórar enn, men ivasamt er, hvussu leingi.

Talsmenn hava ført fram, at hesin parturin av flotanum fiskar av rættindum, sum vit einki lata afturfyri, og tí halda teir, at einki forgjørt hevði verið í, um flotin, sum er so illa fyri orsakað av eitt nú lágum rækjuprísum og høgum oljuútreiðslum, hevði fingið eina ávísa afturbering um skattaskipanina.

### Stuðul ella kvotur

Pauli Justinussen hevur sum so ikki hug at leggja seg út í, um tað almenna skal hjálpa rækjuflotanum við øðrum enn bøttum kvoturættindum.

Hann hevur ikki hug at gera viðmerkingar til, um rækjuflotin skal stuðlast úr landskassanum ella ikki.

- Nei, eg veit ikki, hvat eg skal siga um handa spurningin, sigur skiparin, sum kortini skilir grundgevingarnar um, at føroyska samfelagið ikki rindar fyri tey rættindi, sum rækjuflotin hevur, og at flotin tí kanska kundi væntað sær okkurt slag av afturbering, tá ið hann er so illa fyri.

Pauli sigur, at tað hevði verið ein stórur bati hjá rækjuflotanum, um eitt nú kvotan undir Eysturgrønlandi var størri.

Hann vísir á, at hóast henda kvota er lítil, hevur hon stóran týdning fyri rækjuflotan.

Sum skilst, eiga føroyingar tíggju rækjuloyvi í grønlendskum sjógvi, men bert fimm skip eru í løtuni aftanfyri hesi loyvi. Hinir, sum eiga kvotur, men eingi skip hava, kunnu tískil selja tey tonsini, teimum eru tillutað, til aðrar.

Spurdur, um kvotan hjá teimum fimm skipunum, sum ikki eru í flotanum í løtuni, kanska kundi fallið til tey skipini, sum eftir eru, sigur Pauli:

- Nei, tað dugi eg ikki at siga. Teir, sum eiga loyvini, eiga eisini hesi rættindi. So, tað dugi eg slett ikki at meta um.

Hinvegin ásannar hann, at 115 tons aftrat undir Eysturgrønlandi høvdu komið ógvuliga væl við hjá teimum skipum, sum eftir eru, nú grønlendsk reiðaríir ikki longur sleppa at selja av sínum kvotum, tí grønlendsku myndugleikarnir leggja seg ímillum.

### Fleiri mans við

Pauli dugir ikki at siga, hvussu langa tíð tað fer at taka hjá teimum at fiska tey 115 tonsini undir Eysturgrønlandi.

- Hetta kann taka alt millum 14 dagar og tveir mánaðir – alt eftir, hvussu fiskiskapurin og umstøðurnar verða. Tað kann vera svikaligt at royna á hesum leið-